Álit

í

løgtingsmáli nr. 106/2025: Uppskot til løgtingslóg um leigustuðul

Margit Stórá, landsstýriskvinna í almanna- og bústaðamálum, hevur lagt málið fram 6. mai 2026, og eftir 1. viðgerð tann 8. mai 2026 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 12. og 20. mai 2026.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Vinnuhúsið, Landsfelag Pensjónista, Áhugabólk Pensjónista og landsstýriskvinnuna í almanna- og bústaðamálum.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Grímur Sundstein, Bjørt Lind, Magni Højgaard og Sunnvá Dahl Høgfeldt) hevur hesar viðmerkingar:

Samgongan hevur í samgonguskjalinum sett sær fyri at fremja nøkur átøk, sum skulu loysa tær avbjóðingarnar, sum eru á bústaðarmarknaðinum í dag. Eitt teirra er, at "leigustuðul verður latin húskjum, sum hava lágar inntøkur".

Tað er í dag ongin yvirskipað lóggáva um leigustuðul í Føroyum.

Meðan persónar, sum keypa ein bústað, hava rætt til rentustuðul, verður eingin stuðul veittur teimum, sum búgva til leigu.

Leigustuðulin hevur sum endamál at bøta um fíggjarligu støðuna hjá lág- og miðalløntum føroyingum, sum búgva til leigu. Eisini skapar hetta javnari treytir á bústaðarmarknaðinum millum tey, sum eiga ein bústað, og tey, sum leiga ein bústað.

Harafturat kann leigustuðulin eggja t.d. eldri fólki, sum eiga sethús, at selja sethúsini fyri ístaðin at flyta inn í eina leiguíbúð. Hetta kann vera við til at skapa dynamikk á bústaðarmarknaðinum og gera hann fjøltáttari við at fleiri ymisk býli verða tøk, tí tað gerst fíggjarliga lættari at skifta millum búeindir. Við lógaruppskotinum verða stig tikin til at veita ein inntøkugrundaðan leigustuðul til húski, sum búgva til leigu í Føroyum. Leigustuðulin kann sostatt verða hækkaður, lækkaður ella falla burtur – alt eftir, um inntøkugrundarlagið hjá persóninum ella húskinum broytist, og eftir støddini á húsaleiguni.

Ein partur av teimum, sum búgva í leigubústaði, eru einstaklingar og familjur við lágum inntøkum, har fíggjarligu umstøðurnar ikki geva møguleika at fáa lán til at keypa ein bústað. Nógvar av hesum familjum rinda samstundis eina so stóra húsaleigu, at tað ikki er møguligt at spara saman til at keypa ein bústað í framtíðini. Við lógaruppskotinum fáa hesar familjurnar størri fíggjarligt rásarúm og ein lættari gerandisdag.

Politiska ynskið er, at leigustuðulin ikki skal ávirka rættin til aðrar almannaveitingar, eins og at leigustuðulin skal vera ein skattafrí veiting.

Sambært uppskotinum skal skipanin koma í gildi 1. september 2026. Leigustuðul verður veittur frá mánaðinum eftir, at Almannaverkið hevur móttikið umsóknina, og verður rindaður mánaðarliga afturúr. Tí væntast fyrstu húskini at fáa útgjald fyri oktober 2026.

Undir viðgerðini og í hoyringarskrivum hava fleiri partar víst á, at stuðulshámarkið er ov lágt.

Av tí at talan er um nýggja skipan, ið ikki hevur verið roynd áður, er torført at siga nágreiniliga, hvør kostnaðurin verður. Meirilutin ásannar, at tað kunnu vera húski, sum hava tørv á einum hægri stuðli enn tað, sum hetta lógaruppskotið heimilar. Men av tí, at hagtalsgrundarlagið undir bústaðarmynstrinum og leigubústaðamarknaðinum er veikt, er trupult at meta neyvt um fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum. Harafturat hevur landsstýriskvinnan ein fíggjarligan karm at halda seg til, og tí er avgerð tikin um at byrja varliga fyri at fyribyrgja, at útreiðslurnar í sambandi við leigustuðulin gerast størri enn tað, sum er sett av til endamálið í løgtingsfíggjarlógini.

Ein vansi við uppskotinum er, at effektivi markskatturin verður øktur. Fyri at avmarka ávirkanina á arbeiðsvirknið er mótrokningarprosentið ásett so lágt sum gjørligt. Hetta uppskotið tekur hædd fyri nøkrum av hesum viðurskiftum m.a. skipanini við familjuískoyti, men mugu tillagingar eisini gerast í øðrum lóggávum, sum liggja uttan fyri hettar lógaruppskotið fyri at tálma effektiva markskattinum.

Meirilutin heitir á landsstýriskvinnuna um at skipa fyri, at neyðugt hagtalsgrundarlag fyri bústaðamynstrið og leigubústaðarmarknaðin í Føroyum verður fingið til vega, soleiðis at til ber at gera neyvari metingar, serliga av útreiðslupartinum. Tá nøktandi hagtalsgrundarlag fyriliggur, verður heitt á landsstýriskvinnuna um at endurskoða skipanina.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Sámal Petur í Grund, Liljan Weihe og Bjørg Brynhildardóttir Egholm) hevur hesar viðmerkingar:

Minnilutin tekur undir við lógaruppskotinum, tá ið tað kann hjálpa leigarum. Kortini er vandi fyri, at stuðulin í praksis kann elva til hægri leiguprísir. Tí er týdningarmikið at tryggja, at stuðulin ikki verður grundarlag fyri samsvarandi leiguhækkingum, og at greiðar reglur verða settar fyri, hvat kann metast sum rímiligar leiguhækkingar. Um ætlanin er at javnseta korini hjá leigarum og eigarum so væl sum gjørligt, eigur eisini at verða umhugsað at endurskoða rentustuðulin, soleiðis at hann bert verður latin, so leingi tað er tørvur á honum.

Ynskiligt hevði verið, um vit vóru komin longur í bústaðarpolitikkinum, soleiðis at bústaðartrupulleikarnir ikki vóru so álvarsligir, sum teir eru í dag. Minnilutin leggur tí dent á, at tørvur er á eini heildarregulering av bústaðarmarknaðinum. Bæði langtíðar- og stutttíðarleiga eiga at verða endurskoðaðar, útboðið av bústøðum má økjast, og ítøkilig stig mugu takast fyri at tryggja, at bústaðarmarknaðurin í Føroyum ikki einans verður drivin sum vinna, men eisini er atkomuligur hjá føroyingum, ið hava tørv á bústaði.

Hetta uppskotið kann verða eitt gott stig á leiðini, um tað fer at virka samsvarandi endamálinum í lógaruppskotinum.

Heitt verður á landsstýriskvinnuna um at arbeiða miðvíst og aktivt við bústaðarpolitikkinum og at fylgja neyvt við í, at henda lógin veruliga kemur teimum røttu til góðar.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 23. mai 2026

Grímur Sundstein formaður	Sámal Petur í Grund næstformaður	Liljan Weihe
Sunnvá Dahl Høgfeldt	Magni Højgaard	Bjørt Lind
	Bjørg Brynhildardóttir Egholm	